## Met til Lehmann

Jens Lehmann, týski landsliðsmálverjin, setti met, tá hann fór á vøllin til EM-finaluna. Lehmann, sum tann 10. november verður 39 ár, er nevnliga elsti spælarin, sum hevur spælt í eini EM-finalu. Við hesum hevði hann so eisini møguleikan at gerast elsti spælarin í søguni, sum hevur vunnið EM-heitið, men tann heiðurin fekk hann so ikki – hesu ferð í øllum førum.



## Teir vóru betri

Týski landsliðsvenjarin, Joachim Löw, segði eftir finalutapið, at Spania hevði uppiborið EM-heitið. – Í dag mugu vit bara geva kreditt fyri kvalitetirnar hjá Spania. Teir spældu sera væl, og tekniskt eru teir ótrúliga sterkir. Eg havi tosað við mínar spælarar, og eg bað teir ikki harmast ov nógv. Sjálvandi er tað vónbrot, at vit taptu finaluna, men bara tað at koma somikið langt, er eisini eitt megnar avrik, segði Löw eftir dystin.

# Vinnarin – Aragones

**Luis Aragones hevur ikki altíð verið eins væl lýddur sum spanskur landsliðsvenjari. Men EM-sigurin setir hann á allar ovasta sessin í heimlandinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast árini eru 69 í tali, so er Aragones enn sum ein unglingi. Og tað voldið ikki teir stóru trupulleikarnar at lyfta 7 kilo tunga EM-steypið upp um høvd*

Vísmaðurin úr Hortoleza prógvaði sítt virði, tá Spania í gjárkvøldið lyfti stóra EM-steypinum.

Eins og flestu av undanmonnum sínum, so hevur Luis Aragones av umstøðunum verið mettur sum ein maður, ið ikki megnar at standa ímóti trýstinum, tá harðast leikar á.

Spaniólar hava í so máta eina mest sum ræðandi fótbóltssøgu, tí sæð burtur frá EM-sigrinum á heimavølli í 1964, so hevur Spania ferð eftir ferð skuffað viðhaldsfólkini, júst sum hesi hava hildið, at tey nú áttu kanska besta landsliðið í heiminum.

Soleiðis var eisini, tá Aragones fyri tveimum árum síðani stóð á odda fyri landinum í HM-endaspælinum í Týsklandi. Spania vann allar sínar dystir í innleiðandi bólkinum, men í 1/8-finaluni rendi liðið seg í Frakland, og hóast spanska 1-0 leiðslu, so endaði alt við fronskum 3-1 sigri.

### Tekniskur heilivágur

Í ár hevði Aragones tó funnið rætta heilivágin móti sponsku sjúkuni.

Ágangurin var annars nógvur, tá Aragones undan kappingini staðfesti, at Raul – kongurin í Madrid – ikki var partur av landsliðshópinum. Men við spælinum, sum Spania hevur sýnt, er ilt at síggja, hvussu venjarin kundi gjørt tað betur enn tað sama.

Leikliga hevur Spania verið oman fyri alt og øll í EM-endaspælinum. Tekniski førleikin hjá hvørjum einstøkum spælara er av slíkum slag, at teir støðugt megna at spæla seg úr trýstinum, sum mótstøðuliðini hava roynt at lagt, og hóast finalan »bert« varð vunnin 1-0, so hevur Spania í endaspælinum verið mest skorandi liðið.

Og júst dirvið at tora at líta á egnar dygdir, hevur verið fremsti heilivágurin hjá spaniólunum. Til tíðir hevur tað verið sum at síggja Brasil á einum góðum degi, tá bólturin í kvikum kombinatiónum er sendur kring allan vøllin. Ofta við drepandi stikningum inn um verjuna, tá álopini verða endað.

Og so gjørdi tað mest sum ikki mun, at toppskjúttin, David Villa, noyddist at siga farvæl við EM longu í hálvfinaluni, tá hann mátti skaddur av vøllinum. Hóast Fabregas ikki ger um seg heilt so langt uppi á vøllinum, sum Villa ger tað, so nervaði hetta á ongan hátt spanska spælið. Torres arbeiddi hinvegin tað meira í álopspartinum, og tá Lahm og Lemann so misskiltu hvønnanna, var Torres skjótur við hamaranum.

### Fer til Turlands

Einum sponskum landsliðsvenjara so líkt, so hevur Aragones ofta verið ofta verið útskeldaður og –spiltur í mongu miðlunum, sum burtur av fáast við fótbólt.

Tí mundu tey fæstu í Spania gráta, tá tað longu undan EM-endaspælinum stóð greitt, at Vicente del Bosque verður nýggjur landsliðsvenjari.

Tað kann væl vera, at hetta er ein avgerð, sum bæði spanska fólkið og fótbóltssambandið nú iðra seg um, men Aragones man tó ikki leggja so nógv í hetta. 69 ára gamli vísmaðurin, hevur gjøgnum yrkisleiðina roynt eitt sindur av hvørjum, og nú er hann so til reiðar at skriva enn eitt kapittul í so máta. Hetta tá hann komandi tvey árini skal standa á odda fyri turkiska Fenerbache.

# Besta l

**Spanski EM-sigurin er meira enn nakað ein sigur hjá fótbóltinum. Tekniskt var Spania oman fyri øll hini, og sjálvt ikki týska ímyndin av stríðsviljanum megnaði at steðga teimum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

EM-finalan sunnukvøldið fer kanska ikki í søguni sum tann best spælda í søguni. Til tess var týdningurin av dystinum kanska ov stórur, og tí sást ikki heilt so nógv til spruttandi álopsspælið, sum Spania hevur sýnt í EM-endaspælinum.

Men skuldi ein vinnari finnast, so var Spania so avgjørt tann virðiligasti av øllum. Teir vunnu bólkaspælið við fullum stigatali, og hóast brotsspørk skuldu til í 1/4-finaluni, so var tað ein sigur fyri fótbóltin, at italska verjuspælið ikki vann á spanska dirvinum at leypa á.

Í hálvfinaluni varð annars væl smurda russiska álopsmaskinan turkað væl og virðiliga, og tá Ballack og hinir bíðaðu í finaluni, var Spania eisini omaná.

### Klassamunur

Avgerðin fall longu eftir hálvum tíma. Lahm og Lehmann kundu ikki semjast um, hvør teirra skuldi taka bóltin, tá Xavi sendi bóltin inn um verjuna. Og so var Torres rætti maðurin á rætta staðnum. Í endaspælinum hevur hann kanska ikki víst heilt so gott spæl, sum hann hevur gjørt tað í Liverpool, har hann hetta árið hevur skotið 33 mál. Men hetta hugsaði eingin um, tá hann hegnisliga kipti bóltin upp um skreiðandi Lehmann í týska málinum.

Undan hesum hevði Spania eisini havt aðrar møguleikar. Júst Torres hevði ein drønstútara á stólparótina, og ta einu ferðina hevði Lehmann frálíka refleks-bjarging, sum forðaði Metzelder í at gera sjálvmál.



*Fernando Torres hevur kanska staðið í skugganum av David Villa í endaspælinum. Men Villa varð skaddur í hálvfinaluni, og so traðkaði Torres til, tá avgerandi bólturin skuldi leggjast í týska netið*
Mynd: Polfoto/AP



*EM-endaspælið fekk eitt flott punktum, tá Casillas kundi lyfta stóra steypinum, meðan alt fýrverkið á Ernst Happel Stadion at kalla eksploderaði*
Mynd: Polfoto/AP

Týskarar høvdu sínar møguleikar tíðliga í dystinum, tá Spania tóktist tyngt av nervum, men eftir hetta var at kalla eingin bøn. Eftir leiðslumálið koyrdu spaniólarnir bóltin runt í vøkrum mynstrum, sum Týskland sjáldan megnaði at bróta, og tann gongdin helt sær eftir steðgin.

Skuldi Týskland vinna seg aftur í dystin, so kravdi hetta mest sannlíkt onkran vandamiklan deyðbólt, men kvaliteturin í hesum var